# Jesuspápi og hansara minstu

## *Um tvídráttin millum kristindóm og politikk*



*Jane Mayer hevur skrivað virðislønta bók um ta píning, sum Bush-stjórnin setti í verk*

**Viðmerking**



**Hanus Kamban**

### II. SERLIGAR METODUR

**Fallið**

Tann amerikanska stjórnin og Bush, tann endurføddi kristni, vóru, tá ið farið varð undir at pína fólk, fyri einum stórum moralskum falli. Men einum slíkum falli kann fáur liva við, og tá ið nútíðar lond, eym um sítt umdømi, falla á henda hátt, verður barnið altíð umdoypt. Eins og píning í Sovjetsamveldinum bleiv rópt "fysiskt trýst", varð hon í USA undir Bush rópt "enhanced methods" (økt framferð). At USA framdi píning, varð váttað av ICRC (Altjóða nevndini hjá Reyða Krossi) í eini frágreiðing frá 2007. Henda píning fataði um m.a.:

*at nokta fanganum svøvn við dagalongum áhaldandi larmi*
*at noyða fangan at vera naknan í dagar*
*at sláa og sparka fangan*
*at noyða fangan at standa uppi í tímar*
*at (látast at) kvala fangan í vatni*
*at tvinga fangan at standa í tímar og dagar í køldum vatni*
*at noyða fangan at vera leingi í kulda*
*at stongja fangan inni í trongum kassum*

Eg havi roynt at geva eina hóming av hesum torturi við orðum, sum tola at koma á prent, og at loypa tað mest vamlisliga og ræðuliga um. Men nevnt kann vera, at tað er rættiliga vanligt at heingja fangan eftir skøvningunum upp undir eitt loft og seta streym til pallin, hann stendur á, so hann sparkar pallin til viks og verður hangandi – í tímar.

**Tortursins útveitan**

Maðurin, sum setti ígjøgnum, at USA skuldi fara undir hesa framferð og soleiðis kunna flokkast saman við "óndum" ríkjum sum Sovjetsamveldinum ella Irak, var varaforsetin Dick Cheney. Maðurin, sum skapti tað løgfrøðiliga grundarlagið undir píningini, var David Addington. Men ábyrgdina fyri, at "Harrans minstu" hereftir skuldu verða viðfarin sum dýr, hevði tann endurføddi George W. Bush.

Teimum, sum vilja vita meira um alt hetta, kann eg vísa til bókina *The Dark Side* eftir ta amerikonsku blaðkvinnuna Jane Mayer. Eg fari her at umrøða ein serligan tátt í hesum nýggja amerikanska píningarpolitikkinum, nevniliga tað, sum verður rópt *rendition*, t.e. hetta at "útveita" ella útlisitera píningina. Men latum okkum hoyra málið í Bush eina ferð enn:

*Vit lata ikki fólk upp í hendurnar á londum, sum fremja píning.*

Eg meini tað. Skulu vit ikki trúgva eini útsøgn, sum kemur frá sjálvari idealmyndini hjá mongum í tí kristna heiminum? Nei, tað skulu vit ikki. Bush segði ósatt og visti, at hann segði ósatt. Longu tann 8. januar 2002 gjørdi George W. Bush av at avtaka ta serligu Genevesamtyktina, sum vardi fangar. Hereftir vóru øll handtikin, sek ella ósek, hermenn ella sivilfólk, "unlawful combatants".

**Tá einglar verða til djór**

Men fyri at sleppa undan óhepnum avleiðingum, eitt nú klagum ella pínligum spurningum, í eins egna húsi, varð gjørt av at flyta fangar, sum skuldu pínast, til lond sum Egyptaland, Sýria, Jordan, Marokko, Uzbekistan og Afghanistan.

Ein tann fyrsti, sum smakkaði hesa "útveiting" var sambært Jane Mayer Al Qaeda-limurin Ibn al-Shaykh al-Libi. Hann varð handtikin av pakistanum tann 19. desember 2001, latin amerikumonnum, og FBI hevði við vanligari avhoyring fingið hann væl á glið, tá CIA legði upp í. Ein CIA-yvirmaður kom brestandi inn í avhoyringarrúmið og

*"You're going to Egypt!" he yelled. "And while you're there, I'm going to find your mother and fuck her!"* (Mayer s 106)

Eg vóni ikki, at hetta orðalagið hevur eyðkent tey bønarmøti, saman við Bush, sum einstakir føringar altráir hava leitað til. Men henda mentan og hetta orðalag var ein frukt av tí nýggja politikkinum hjá Bush og Cheney.

Heima hjá okkum, har ein nýggj analfabetisma nú breiðir seg og seyrar spakuliga út í allar samfelagsins krókar – uttan at eitt einasta vakið eyga blunkar - er ikki óvanligt at síggja tað stolta heitið *humanistur* brúkt hálvavegna sum illbøn. Eg fari her at endurgeva ein av hesum humanistum, tann kristna franska essayistin Michel de Montaigne (1533-92). Hann sigur í sínum essay *Um royndir*, um menniskjuni, at

*í staðin fyri at skapa seg um til einglar, skapa tey seg um til dýr.*

og lýsir við hesum fyndugu orðum tað moralska fallið hjá tí neokonservativu amerikonsku stjórnini.

**Hørð mótstøða**

Um Al-Libi er at siga, at hann bleiv píndur so illa, at hann at enda var fúsur at siga, hvat tað skuldi vera. Hóast hann púra einki visti um nakað samband millum Al Qaeda og Saddam Hussein, bleiv hann við píning av egyptum tvingaður til at vátta, at eitt slíkt samband var. Hansara "vitnisburður" var sjávt støðið undir avgerðini um at fara í kríggj við Irak. Og m.a. sum ein avleiðing av hesum kríggi standa Taleban nú til at vinna í Afghanistan. Um Al-Libi siga óváttað tíðindir, at hann doyði, grivin livandi úti í oyðimørkini. Tá var hann farin av vitinum.

Tað skal sigast, tí demokratiska USA til verju, at mótstøðan, bæði ímóti at pína fangar og at útlisitera fangapíning, var stór. Royndir FBI-yvirmenn sum Jack Cloonan og Daniel Coleman vóru hart ímóti píning og útveitan og vístu m.a. á, at slík framferð ikki gav myndugleikunum stórvegis av veruligari vitan um terrorismu og ofta villeiddi teir.

Uttanríkisráðharri Colin Powell var eisini ímóti píning, men var við undirlutan í tvídráttinum við Cheney og Bush. Eisini kendir republikanarar mæltu hvassliga ímóti at torturera fólk.

**Ein kanadiskur hampamaður**

Lagnan hjá tí kanadiska verkfrøðinginum Maher Arrar er eitt dømi um, hvørjar avleiðingar fyribrigdið *rendition* kundi fáa fyri vanlig hampafólk. Arrar var ættaður úr Sýria, fluttur til Kanada sum tannáringur, hevði prógv frá McGill lærda háskúla, var 34 ár, giftur og hevði tvey smá børn. Kona hansara eitur Monica Mazigh. Hann var á heimferð úr Tunis, har hann hevði verið og ferðast, og flogfarið steðgaði í John F. Kennedy floghavnini í New York. Har varð hann handtikin tann 26. september 2002 og fyrst hildin fangi í 13 dagar.

Ein morgunin klokkan trý bleiv Maher Arrar leinkjaður og koyrdur til New Jersey. Haðani varð hann førdur í flogfari fyrst til Washington, D.C., og flogin víðari til Bangor í Maine, víðari til Rom í Italia og haðani til Miðeystur. Haðani hann sat, kundi hann á einum lítlum skíggja eygleiða rutuna hjá flogfarinum. Hann visti, at Sýria er tiltikið fyri at pína fangar, og tá ið hann sá, at leiðin gekk móti Miðeystri, kom ræðsla á hann. Hann bønaði teir í flogfarinum um ikki at senda seg til Sýria, men einki hjálpti.

*"Alla tíðina," segði hann, "hugsaði eg, at eg varð fluttur út at blíva píndur. Á Gud, hugsaði eg, hvussu skal eg sleppa undan tí?"* (Mayer s 130).

Maher Arrar varð fyrst førdur til Amman í Jordan. Tíggju tímar seinni varð hann koyrdur til Sýria. Í ein dag varð hann avhoyrdur og hóttur, og so fóru menn at sláa hann:

*Teir slóu hann á hendurnar umaftur og umaftur við tveytumma tjúkkum elektriskum leidningum og stongdu hann inni í eini sprekku ("slot"), ið var sum eitt fólk til støddar, niðri í einum vindeygaleysum kliva*